# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar



*1. november fingu Margit og Símun Petur Anthoniussen, búsitandi í Kolding, ein son. Hann vigaði 3330 gr. og var 52 cm langur.*

9. november fingu Jessie Órielly og Esbern Antoniussen, Høje Tåstrup, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3560 gr.

10. november fingu Tóra Joensen og Bjarni Finnur Henriksen, Ørslev, Danmark, eina dóttur. Hon vigaði 5100 gram og var 58 cm long.

10. november fingu Anna Elisabeth Simonsen og Johnny Petersen, Sandavági, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3400 gr.

12. november fingu Joan Gardar og Poul Magnussen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3750 gr.

14. november fingu Mariann á Válinum og Gert Joensen, Kollafirði, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3400 gr.

14. november fingu Henrietta Joensen og Niels Jákup T. Nielsen, Fámjin, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3450 gr.

16. november fingu Brynhild W. Djurhuus, Tórshavn, og André F. Danielsen, Strondum, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4300 gr.

16. november fingu Oddbjørg og Niclas Joensen, Argjum, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3800 gr.

16. november fingu Esther A. H. Skillicorn, Leynum, og Benadikt Olsen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3350 gr.

17. november fingu Malena og Torkil Hansen, Fuglafirði, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3100 gr.

# Minningarorð um Poul Wang

**f. 5. apríl 1908 - d. 14. februar 2004**



Í februar andaðist Poul Wang, knappliga 96 ára gamal. Í 1965 komu Pól og Ebba til Hoyvíkar, tí Pól hevði tikið við festinum á Hoyvíksgarði. Pól var íðin at røkja seyð og garð, og garðurin í Hoyvík fekk sera góðan trivnað. Pól og Ebba fluttu ikki inn í gomlu bóndahúsini heimi á garði men í húsini, ið foreldur Ebbu áttu uttan fyri Garðar, og Pól hevði mjólkneytini í gamla fjósinum heimi á Garði. Hetta aldagamla fjós er nú partur av útisavninum hjá Føroya Fornminnissavni.

Pól var ikki borin til garð, hann kom tó at sita á tveimum gørðum. Pól var bóndasonur úr Kaldbak. Hann var sonur Zakaris í Sólgørðum og Marina, ið var bóndadóttir úr Hoyvík. Báðir eldru brøður hansara doyðu á ungum árum, og tískil stóð Pól til festið í Sólgørðum. Hann festi í 1937, og í 1938 giftist hann við Ebbu Simonsen úr Hoyvík, ið var dóttir Súsonnu og Hans Simonsen uttan fyri Garðar. Pól sat við festinum á Sólgørðum í sløk 30 ár. Í 1965 fluttu Ebba og Pól til Hoyvíkar, og Pól gjørdist bóndi á Hoyvíksgarði. Tá tók elsti sonurin Eyðun við festinum í Kaldbak.

Pól var blíður og prátingarsamur. Nógv fólk munnu hava hitt hann á máli í túninum um morgnarnar heimi á Garði. Tað var hugaligt at práta við Pól, meðan hann tókst við neytini har heimi. Nógvar aðrar góðar løtur minnist ein aftur á, t.d. langar sólskinsdagar í hoygging, tá ið Ebba kom út í bøin við drekka, góðar løtur á fjalli og hugnaligar løtur við práti í stovuni hjá Ebbu og honum, har Pól ofta sat og nappaði, tí helst skuldi eingin løta fara til spillis.

Poul gekk burtur í haga, til hann nærkaðist teimum níti, so fóru knøini at bila. Hann gekk á fjall, til hann var knapt 90 ára gamal, og hann helt á at marka øll lombindi, til hann var 91 ára gamal. Tað munnu ikki vera nógvir, ið høvdu gjørt honum tað eftir.

Poul var altíð í góðum lag, bert nívdi tað hann, um seyðurin ikki hevði tað gott, t.d. í ringum kavaveðri. Pól var arbeiðssamur sum fáur, dugdi væl at leggja sær arbeiðið til rættis og fekk tí meiri av skafti enn tey flestu. Prátingarsamur, hugagóður og tíðindafróður, soleiðis minnast vit hann og soleiðis sakna vit hann. Hann setti sín dám á bygdarlagið uttan fyri Garðar og heimi á Garði. Altíð tókst hann við okkurt, bøtti um jørðina, velti og gekk íðuliga burtur í haga. Altíð sást tú hann fara við stavinum framvið, tá ið leiðin gekk annaðhvørt niðan í hagan ella oman. Lættur upp á sporið var hann eisini á ellisárum. Poul hevði sera góðan seyðahug, hann helt á at ganga burtur í haga og røkja, líka til hann var um níti ára gamal, sjálvt um sonurin Hanus hevði tikið við festinum í 1976. Tá ið sporini gjørdust heldur tung at ganga burtur í haga, gekk hann oman at geva seyðinum, ið gekk úti í Byrgi, t.e. í dalinum millum Byrgistanga og Rógvutanga.

Men seinastu árini versnaði heilsan, og hann kom tí ikki at ragga síni síðstu spor í túnunum í Hoyvík, men kom at vera á røktarheimi nøkur ár. Hann var tó altíð væl hýrdur og hugaligt var at vitja Pól, tí minnini vóru har, og hann plagdi at siga, at hann keddi seg ongantíð, tí hann hevði upplivað so mangt, sum hann kundi minnast aftur á, og tað hevði hann nógva gleði av. Í hugaheimi Póls ráddi tað um at vera virkin og fáa nakað frá hondini, tað gav lívi hansara innihald. Men eisini skuldu vera stundir til at práta og fylgja við í tí, sum hendi uttan um ein. Pól hevði upplivað tvey kríggj og tær risastóru broytingar, ið hendu á landbúnaðarøkinum í seinastu øld. Hann var fyrsti næmingur á Roynd-arstøðini (1925), og í 1926/27 var hann á Føroya Fólkaháskúla. Í 1932 var hann eitt summar á Sejlstrup gård í Jútlandi. Soleiðis búði hann seg til at verða bóndi. Hann upplivdi, hvussu tað var at reka ein garð, áðrenn nøkur maskinamboð vóru komin higar. Pól keypti tann fyrsta motorlíggjan, ið Føroya Búnaðarfelag hevði at selja, og hann segði, at tað gjørdi undurverk í slóttinum. Pól fór tó ongantíð at nýta mjólkimaskinu, men mjólkaði øll árini við hond. Hann duldi ongantíð fyri, at tað var eitt strævið lív at vera bóndi, og hóast nógv góð tól komu, so mátti arbeiðast kortini. Eftir hansara tykki var fortreytin fyri at vera bóndi at duga við og hava hug til kríatúr. Og tað hevði hann sum fáur.

Takk fyri góð minni.

**Guddóttirin**

## Andlát

11. november
Sámal Júst Ziska, Klaksvík, 51 ár.

12. november
Bertha Larsen í Klaksvík, 83 ár.

13. november
Ella Hansen, fødd Rubeksen, Tórshavn, 89 ár.

16. november
Lovisa Johannessen á Hellunum, 89 ár.
Rigmor Restorff, í Tórshavn, 86 ár.

17. november
Jóhann Sandoy, vanliga nevndur Jóhann í Skemmuni, á Sandi, 94 ár.

## 85 ára føðingardagar

Leygardagin 20. november fyllir Helena Tausen, Runavík 85 ár.
Dagurin verður hildin hjá dóttrini Fridu Hansen í Runavík.

Leygardagin 20. november verður Johan Jákup Djurhuus á Selatrað 85 ár.
Dagurin verður hildin hjá soninum Jóhan Djurhuus.

## 75 ára føðingardagur

21. november verður Jukim Olsen 75 ár.
Móttøka verður á Hotel Hafnia leygarmorgunin 20. nov. frá kl. 9.00-12.00.

## 70 ára føðingardagur

Leygardagin 20. november verður Sólgerð Hansen Norðberg, Tórshavn, 70 ár.
Opið hús verður í heiminum frá kl. 10.00 til 16.00.

## Gullbrúdleyp

Sunnudagin 21. november hava hjúnini Oda og Havstein Ellingsgaard, Toftir, gullbrúdleyp.
Dagurin verður hildin saman við familjuni.

## Brúdleyp

Týsdagin 16. november *giftust* í prestagarðinum í Klaksvík Hervør
Eyðunsdóttir og Rani Nolsøe, bæði úr Klaksvík.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Jukim Olsen 75 ár



Sunnudagin 21. november fyllir Jukim Olsen í Havn 75 ár. Jukim er ættaður úr Svínoy, yngsti sonur Jógvan og Elsebeth Malenu (Elsmalenu) á Geilini.

Foreldrini vóru dupult systkinabørn við tað, at ommurnar báðar vóru systrar úr Ovastahúsi og abbarnir brøður Uppi í Húsi.

Brøðurnir vóru Petur (Pedda), sum var ógiftur og búði úti í Svínoy. Hann doyði í 1998. Olivur, sum er giftur við Johannu Hansen úr Vátutoft, tey búgva í Klaksvík. Esbern, sum fekk sær eftirnavnið á Geilini, var giftur við Elmu Reinert úr Norðradali. Tey búðu í Svínoy. Esbern doyði í 1985. Yngstur var sum nevnt Jukim.

Jukim gekk í barnaskúla úti í Svínoy. Hann fór á Háskúlan í Havn og í Kungälv í Svøríki. Í 1955 fór hann til Havnar at ganga á stýrimansskúla.

Í 1957 giftist hann við við Elsebeth, dóttir Ellu og Andrew Sloan. Elsebeth doyði í 2000. Tey fingu børnini Elin, sum er gift við Jógvan Norðbúð og býr í Havn, Jógvan, sum býr í Svínoy, og Katrin, sum eisini býr í Havn og er gift við John Nielsen. Abbabørnini eru 5 í tali.

Í 1957 fór Jukim á skipsføraraskúla í Keypmannahavn. Hann sigldi úti í nøkur ár. Síðani sigldi hann við doktarabátinum Reyða Krossi. Í 1964 fór hann at arbeiða á Matrikulstovuni, har hann var, til hann gavst fyri aldur.

Jukim er søgufróur maður, og hann hevur eisini stóran áhuga fyri slekt.

Hann hevur gjørt eitt stórt arbeiði innan fyri samkomuna Ebeneser.

Góða systkinabarnið. Finnbogi og eg ynskja tær hjartaliga til lukku við føðingardegnum.

**Ása Justinussen**

# Greta og Levi Joensen gullbrúdleyp



Í dag, leygardagin 20. november, eru tað 50 ár síðani, at Greta og Levi Joensen í Klaksvík gingu saman í hjúnalag. Síðani í 1984 hava tey bæði stóran part av tíðini verið í Hirtshals. Seinastu árini hava tey tó verið í Klaksvík myrkastu mánaðirnar. Stóri dagurin hjá teimum báðum verður hildin í Betesda í dag. Har verður opið hús frá kl. 4 seinnapartin.

Selma Margretha ella Greta, sum hon altíð hevur verið nevnd, er fødd 16. oktober 1932 og ættað úr Fuglafirði. Foreldrini vóru Jana og Poul Nolsøe Olsen ella Leirvíks Poul, sum hann varð nevndur. Greta er nummar fimm í røðini av teimum átta børnunum, sum Jana og Poul fingu.

Greta kom ung til Klaksvíkar. Hon var í húsinum hjá Giggu og Theodor við Keldu. Tey góvu henni tað skoðsmál, at hon, hóast hon var blaðung, var ábyrgdarfull, sera umgeingilig og røsk.

Levi, sum er føddur 12. oktober í 1933, er sonur Armgaard og Dávur Joensen ella Dáva úr Gerðum, sum hann altíð varð nevndur. Levi var yngstur av tíggju systkjum.

Tað var longu runnið saman millum Gretu og Levi, áðrenn hon kom til Klaksvíkar. Tá ið tey fyri hálvari øld síðani og blaðung giftust, settu tey búgv á Vágsheygnum, har foreldur hansara frammanundan búðu. Upprunaliga var tað Karl á Vágsheygnum, sum var abbi Armgaard og harvið langabbi Levi, ið setti seg niður her fyrrapartin av 1860unum. Hann var bóndasonur úr Gerðum og fyrsti maður, sum búsettist á Vágsheygnum. Armgaard og Dávur giftust inn á Vágsheygnum, og seinni umbygdi Dávur húsini. Greta og Levi búgva framvegis á Vágsheygnum, tá ið tey eru í Klaksvík.

Síðani í 1984 hava Greta og Levi verið í fulltíðar kristiligum arbeiði í Danmark. Í fyrstu atløgu var tað serliga arbeiði millum føroyskar sjómenn í Danmark, sum tey kendu ábyrgd fyri. Men virksemið øktist rættuliga skjótt. Hús vórðu keypt, sum verða nevnd Malta, og nú er lutfalsliga stór samkoma í Hirtshals, har nógvir føroyingar savnast. Framvegis er tað soleiðis, at nógvir sjómenn vitja á gátt, og har njóta teir blíðsskap frá Gretu og práta við Levi. Saman við øðrum ger Levi hvønn mánað møtiferðir suður ígjøgnum Jylland. Eitt nú verður vitjað í Esbjerg, Vejle og Sønderborg. Tey hava eisini vitjað á eitt nú Bornholm og í Frederikshavn, og tá ið tey eru í Føroyum, eru tey dúglig at vitja kring landið við góða boðskapinum.

Greta og Levi eiga fimm børn: Jóhan Páll, Malan, Jóna, Rógvi og Mirjam. Fýra tey fyrstu búgva í Klaksvík, og Mirjam býr í Runavík. Barnabørnini eru sekstan, og higartil eru fýra komin í triðja ættarliðnum.

Levi fór blaðungur til skips, og á sjónum var hansara arbeiðslív. Fyrsta skipið var trolarin Dragaberg, sum Jóannes, beiggi Levi, førdi. Síðani var Levi við Skálanesi, sum pápin átti saman við Kjølbro, og sum elsti beiggin, Óli, førdi, eftir at pápin var uppilagstur.

Í mars í 1955 tók Levi skiparaprógv í Klaksvík, og eftir tað førdi hann nógv skip: Viðoy, Skálanes, Stella Maria, Stella Karina, Klettur, sum hann sjálvur átti, Porkerisnes og av og á útróðrarbátarnar Soli deo Gloria, sum Jóannes átti, og Byrgi, sum Dávavirkið átti.

Seinni var Levi við kraftblokkaskipum. Eitt nú sigldi hann við skipunum hjá vinmanninum Eileri Jacobsen og við Polaris. Hesi skipini sigldu nógv upp á Hirtshals, og tá var tað, at Levi fekk visiónini um at fara undir kristiligt verk í Danmark. Í fyrstu atløgu skipaði hann saman við øðrum fyri møtirøðum í Hirtshals um sumrarnar, og so var tað, at Malta varð keypt, og Greta og Levi fluttu til Danmarkar.

Ikki minst hjá sjómanni og honum, sum á landi hevur havt so alment virksemi, sum Levi hevur verið uppií, hevur tað havt stóran týdning at hava ein góðan bakk. Eingin, sum kennir tey bæði, ivast í, at Greta hevur røkt uppgávuna til lítar.

## Dagurin

**20. november. Volkmarus.** Einki halgimenni ber hetta navnið, men navnið er komið í álmanakkarnar í 1730.

**21. november. Mariu offurgerð**. Dagurin hildin til minnis um, at foreldrini leiddu hana niðan í halgidómin. 3 ára gomul gekk Maria einsamøll niðan tær 15 trappurnar inn í hitt alraheilagsta, har rætta tilhald hennara átti at vera.

**22. november. Cecilia**, deyð umleið ár 225. Rómversk genta, sum frá barnsbeini hevði verið kristin. Foreldur hennara góvu hana í hjúnalag við heidnan ungan mann, Valerianus, men sjálva brúðarnáttina umvendi hon hann. Varð tikin av døgum í Róm sum pínsluváttur.

Kona ella frilla Brestis æt Cecilia og var móðir Sigmunds Brestissonar. Føroysku nøvnini hava verið Sissal, Silja og Silla.

Cecilia gjørdist verndarhalgimenni fyri tónleik, og tað sigst, at tað er sjálvur Rafael, sum hevur gjørt málning av henni sitandi við urgu við nótablaðið í hendi.

Rómverskt ættarnavn, merkir *tann blinda.*

*Nicolai Mohr varð føddur hendan dagin í 1742.*

†

Okkara elskaða mamma

**Rigmor Restorff**
**Tórshavn**

andaðist í heiminum týsdagin 16. november,
86 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju
leygardagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*

**Rasmus, Marianna og Durita**

Tey, ið ynskja at minnast Rigmor, kunnu lata eina peningagávu til Tórshavnar Musikskúla - konta í peningastovnunum.

# Tøkk

Hjartaliga vilja vit takka øllum tykkum, ið á ymsan
hátt sýndu samkenslu,
tá okkara kæri maður, pápi, verpápi og abbi

**Arthur Midjord**
**Tvøroyri**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri kransar, blómur, gávur og heilsanir.
Ein serlig tøkk til tykkum á Suðuroyar Sjúkrahúsi,
á skurðdeildini á Landssjúkrahúsinum
og tyrlumanningina.
Tøkk til tykkum, sum hjálptu til og fylgdi honum,
bæði úr kapellinum og kirkjuni,
til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*

**Jessie, Ronnié, Tina, Egil, Ingun, Derek og Ann-Kari**